Innkalling til aðalfund í P/F Bakkafrost

# Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Bakkafrost

Aðalfundurin verður hildin í hølum felagsins á Bakkavegi 9, 625 Glyvrar,
**týsdagin 30. apríl 2024, kl. 15.00**

**Dagsskráin fyri fundin verður hendan:**

**1. Val av fundarstjóra**

**2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári**

**3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar**

Uppskot til ársfrásøgn fyri 2023 við notum fyri P/F Bakkafrost og fyri Bakkafrost samtakið, sum eisini inniheldur frágreiðing frá nevnd og stjórn felagsins og grannskoðaraátekning fyri 2023, er at finna á heimasíðu felagsins www.bakkafrost.com.

**4. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum**

Viðvíkjandi avgerð um nýtslu av yvirskoti skjýtur nevnd felagsins upp soljóðandi samtykt:

*„Goldið verður vinningsbýti til partaeigarar felagsins við 8,70 kr. fyri hvørt partabræv, svarandi til eina samlaða upphædd áljóðandi 515 mió. kr. Vinningsbýtið verður útgoldið til teir partaeigarar, sum eru skrásettir í VPS við afturlatingartíð tann 30. apríl 2024. Eftir útgjald av vinningsbýti er flutti vinningurin tilsamans 10.148 mió. kr.*

*Partabrøv felagsins verða skrásett uttan vinningsbýti frá 2. mai 2024, og skrásetingardagurin (record date) er 3. mai 2024.*

*Vinningsbýtið verður væntandi útgoldið um 21. mai 2024."*

**5. Val av nevnd**

Nevndarlimir felagsins verða valdir fyri 1 ár í senn. Afturval kann fara fram. Sambært viðtøkum felagsins skal valnevndin gera innstilling til aðalfundin um val av nevndarlimum.

Í nevndini sita, umframt formannin, sum verður valdur beinleiðis av aðalfundinum, Gurið Højgaard, Annika Frederiksberg, Einar Wathne, Øystein Sandvik og Teitur Samuelsen.

Valnevnd felagsins skjýtur upp at Gurið Højgaard, Annika Frederiksberg, Einar Wathne, Øystein Sandvik og Teitur Samuelsen verða afturvald, umfamt formannin. Harafturat verður skotið upp at velja Alf-Helge Aarskog sum nýggjan nevndarlim.

Ein frágreiðing um nevndarlimirnarm íroknað teirra óheftni mótvegis Bakkafrost, verður viðløgd sum fylgiskjal 1 til hesa lýsing.

**6. Val av nevndarfomanni**

Nevndarformaðurin verður sambært viðtøkum felagsins valdur beinleiðis av aðalfundinum. Nevndarformaður er Rúni M Hansen.

Nevndarformaðurin verður valdur fyri 1 ár í senn. Nevndarformaðurin kann verða afturvaldur. Sambært viðtøkunum skal valnevndin gera innstilling til aðalfundin um var av nevndarformanni.

Valnevnd felagsins skjýtur upp afturval av Rúna M. Hansen sum nevndarformann.

**7. Ásetan av samsýning til nevndina, grannskoðaranevndina og samsýningarnevndina**

Valnevnd felagsins skjýtur upp, at nevndarlønin fyri 2024 verður hendan:

Nevndarlimir fáa 255.000 kr. um árið, og formaðurin fær 510.000 kr. um árið.

Valnevnd felagsins skjýtur upp, at samsýningin til nevndarlimir í grannskoðaranevndini verður 52.200 kr. um árið.

Valnevndin skjýtur upp, at samsýningin til nevndarlimir í samsýningarnevndini verður 26.100 kr. um árið.

**8. Val av limum til valnevndina, herundir val av formanni til valnevndina**

Til hendan aðalfundin standa Gunnar í Liða og Rógvi Jacobsen fyri vali. Gunnar í Liða er roknaður sum óheftur av Bakkafrost, meðan Rógvi Jacobsen ikki er mettur at vera óheftur. Hinir nevndarlimirnir eru roknaðir fyri at vera óheftir.

Valnevndin skjýtur upp afturval av Gunnar í Liða og Rógva Jacobsen.

Valnevndin skjýtur upp afturval av Gunnari í Liða til formann fyri valnevndina.

**9. Ásetan av samsýning til valnevndina**

Valnevnd felagsins skjýtur upp, at samsýningin í 2024 til limir í valnevndini verður óbroytt 14.000 kr. um árið til nevndarlimir og óbroytt 28.000 kr. til formanin í valnevndini.

**10. Val av grannskoðara**

Grannskoðari felagsins er P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn, við Fróða Sivertsen (síðani 2017, tó undantikið í 2021) og John M Petersen (síðani 2021) sum høvuðsgrannskoðara.

Nevndin skjýtur upp afturval av grannskoðara felagsins at sita til næsta ársaðalfund.

**11. Samsýningarpolitikkur**

Við tilvísing til grein 10, stk. 4, í viðtøkum felagsins skjýtur nevndin upp, at galdandi leiðreglur fyri samsýning til leiðslu felagsins, sum vórðu samtyktar á aðalfundi felagsins í 2018, verða óbroyttar galdandi fyri roknskaparárið 2024. Felagssins samsýningarpolitikkur kann síggjast á heimasíðuni hjá felagnum www.bakkafrost.com. Samsýningarnevndin hevur ábyrgdina av at tryggja at samsýningarpolitikkurin verður fylgdur.

**12. Uppskot til viðtøkubroytingar**

Vegna krøv í føroyskari lóggávu skjýtur nevndin upp at财 teksturin niðanfyri verður skoyttur uppí § 4. Viðtøkubroytingarnar hava ongan ávirkan á hvussu fyritøkan verður rikin ella stjórnað.

*"Felagið kann ikki beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum tað samband, sum nevnt er í § 7 í vinnufelagalógini, hava ræði á 50 prosentum ella meira av føroyskum aliloyvum, sbrt. løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum.*

*Er ein fyritøka ein afturatknýtt fyritøka at felagnum, sambært § 7, stk. 4 í nevndu løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009, ella eru tvær ella fleiri fyritøkur afturatknýttar felagnum, kann felagið og afturatknýttu fyritøkurnar tilsamans ikki hava ræði á 50 prosentum ella meira av aliloyvunum. Hevur ein fysiskur persónur ávirkan á felagið, sum nevnt í § 7, stk. 4 í nevndu løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009, er fyritøkan afturatknýtt fyritøka.*

*Eingin kann útinna síni umsitingarligu rættindi í felagnum í stríð við omanfyri nevndu ásetingar í stk. 6, 7 og 8.*

*Ein og hvør, sum hevur ræði á aliloyvum, sbr. § 7, stk. 2 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum og ein og hvør, sum hevur ræði á kapitalpørtum sbr. § 7, stk. 3 í somu løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum, skal boða felagnum frá hesum.*

*Ein og hvør, sum ikki er heimahoyrandi í Føroyum, og sum hevur ræði á meira enn 20 prosentum av felagskapitalinum í felagnum, sbr. § 7 a, stk. 1-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum, skal boða felagnum frá.*

*Tann, sum hevur ræði á kapitalpørtum, sbr. § 7, stk. 3 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytinum, í tveimum ella fleiri alifeløgum skal, umframt at boða felagnum frá um eigaraviðurskiftini í alifelagnum, eisini boða felagnum frá um eigarapartin í hinum alifeløgunum.*

*Hevur felagið fingið fráboðan, sum nevnt omanfyri í stk. 10 - 12, skal felagið boða fyritøkuni, sum hevur ræði á felagnum, sbr. § 7, stk. 2 ella kapitaleigarunum, sbr. § 7, stk. 3 og § 7 a, stk. 2-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum frá, at møtirætturin og atkvøðurætturin á aðalfundi felagsins ikki kann útinnast í stríð við viðtøkur felagsins, sambært stk. 6, 7 og 8 omanfyri.*

*Felagið hevur skyldu til skjótast gjørligt boða landsstýrismanninum frá um fráboðanir eftir § 18a, stk. 1-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum."*

Samstundis verður § 4 síðsta petti strikað, sum er soljóðandi:

*"Eingin juridiskur persónur, sum ikki lýkur treytirnar í §7a, stk. 4, litra 1), 2) og 3) í løgtingslóg nr. 85 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum og eingin fysiskur persónur, sum ikki lýkur treytirnar í §7a, stk. 3, litra 1) og 2) í somu løgtingslóg, kann hava ræðið á meira enn 20% av partabrøvum felagsins, ella 20% av partabrøvum í móðurfelag felagsins. Eingin partaeigari kann útinna síni fíggjarligu og umsitingarligu rættindi í felagum og í móðurfelag felagsins í stríð við hesar ásetingar"*

Samsvarandi hesum skjýtur nevndin upp, at § 4 í viðtøkum felagsins verður soljóðandi:

*"Partabrøvini skulu ljóða upp á navn.*

*Partabrøvini skulu vera umfaraskjøl.*

*Eingi partabrøv hava serlig rættindi.*

*Tað eru ongar avmarkingar galdandi viðvíkjandi sølu ella aðrari yvirgongd av partabrøvum.*

*Partabrøv felagsins verða útskrivað gjøgnum VPS ASA, Biskop Gunnerus Gate 10, 0185 Oslo, áljóðandi hvørt á DKK 1 samsvarandi teimum reglum, sum eru galdandi fyri útskriving av virðisbrævaskrásettum partabrøvum. Vinningsbýtið verður útgoldið sambært teimum reglum, sum eru galdandi hesum viðvíkjandi. Øll rættindi viðvíkjandi partabrøvunum felagsins skulu fráboðast til VPS ASA.*

*Partabrævabók felagsins verður førd av Nordea Bank Norge ASA, Middelthuns gate 17, P.O. Box 1166 Sentrum, NO-0107 Oslo, Norway.*

*Eingin løgfrøðiligur persónur, sum ikki lýkur treytirnar í § 7a, stk. 4, litra 1), 2) og 3) í løgtingslóg nr. 85 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum og eingin fysiskur persónur, sum ikki lýkur treytirnar í §7a, stk. 3, litra 1) og 2) í somu løgtingslóg, kann hava ræðið á meira enn 20% av partabrøvum felagsins, ella 20% av partabrøvum í móðurfelag felagsins. Eingin partaeigari kann útinna síni fíggjarligu og umsitingarligu rættindi í felagum og í móðurfelag felagsins í stríð við hesar ásetingar.*

*Felagið kann ikki beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum tað samband, sum nevnt er í § 7 í vinnufelagalógini, hava ræði á 50 prosentum ella meira av føroyskum aliloyvum, sbrt. løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum.*

*Er ein fyritøka ein afturatknýtt fyritøka at felagnum, sambært § 7, stk. 4 í nevndu løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009, ella eru tvær ella fleiri fyritøkur afturatknýttar felagnum, kann felagið og afturatknýttu fyritøkurnar tilsamans ikki hava ræði á 50 prosentum ella meira av aliloyvunum. Hevur ein fysiskur persónur ávirkan á felagið, sum nevnt í § 7, stk. 4 í nevndu løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009, er fyritøkan afturatknýtt fyritøka.*

*Eingin kann útinna síni umsitingarligu rættindi í felagnum í stríð við omanfyri nevndu ásetingar í stk. 6, 7 og 8.*

*Ein og hvør, sum hevur ræði á aliloyvum, sbr. § 7, stk. 2 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum og ein og hvør, sum hevur ræði á kapitalpørtum sbr. § 7, stk. 3 í somu løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum, skal boða felagnum frá hesum.*

*Ein og hvør, sum ikki er heimahoyrandi í Føroyum, og sum hevur ræði á meira enn 20 prosentum av felagskapitalinum í felagnum, sbr. § 7 a, stk. 1-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 við seinni broytingum, skal boða felagnum frá.*

*Tann, sum hevur ræði á kapitalpørtum, sbr. § 7, stk. 3 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytinum, í tveimum ella fleiri alifeløgum skal, umframt at boða felagnum frá um eigaraviðurskiftini í alifelagnum, eisini boða felagnum frá um eigarapartin í hinum alifeløgunum.*

*Hevur felagið fingið fráboðan, sum nevnt omanfyri í stk. 10 - 12, skal felagið boða fyritøkuni, sum hevur ræði á felagnum, sbr. § 7, stk. 2 ella kapitaleigarunum, sbr. § 7, stk. 3 og § 7 a, stk. 2-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum frá, at møtirætturin og atkvøðurætturin á aðalfundi felagsins ikki kann útinnast í stríð við viðtøkur felagsins, sambært stk. 6, 7 og 8 omanfyri.*

*Felagið hevur skyldu til skjótast gjørligt boða landsstýrismanninum frá um fráboðanir eftir § 18a, stk. 1-4 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. maj 2009 við seinni broytingum."*

Áðrenn aðalfundin í 2022 var ein áseting galdandi sum § 4B í viðtøkum felagsins, sum gav nevndini heimild til at keypa egin partabrøv. Heimildin hjá nevndini at keypa egin partabrøv gekk út á aðalfundinum 2022.

Nevndin skjýtur upp at nevndin aftur fær hesa heimild, galdandi til aðalfundin, sum verður hildin í 2029. Nevndin skjýtur upp, at heimildin er avmarkað, eins og hon aður hevur verið, soleiðis, at nevndin í mesta lagi má keypa egin partabrøv, svarandi til 10% av samlaða partapeninginum.

Samsvarandi hesum skjýtur nevndin upp, at § 4B í viðtøkum felagsins verður soljóðandi:

*"Í tíðarskeiðinum frá 30. apríl 2024 til vanliga ársaðalfundin, sum verður hildin í 2029, hevur nevnd felagsins heimild til vegna felagið at keypa egin partabrøv í felagnum. Keyp av egnum partabrøvum skal fara fram til eitt kursvirði, sum svarar til almenna kursvirði á virðisbrævamarknaðinum, men nevndin kann undir serligum umstøðum víkja frá almenna kursvirðinum við upp til 10%. Felagið kann ongantíð eiga meir enn 10% av samlaða partapeningi felagsins."*

Sambært § 5 í viðtøkum felagsins skulu ársaðalfundir haldast áðrenn endan av apríl mánaði. Nevndir skjýtir upp at broyta tíðarfreistina til endan av mai.

Samsvarandi hesum skjýtur nevndin upp, at § 5 í viðtøkum felagsins verður soljóðandi:

*"Innkallað verður til aðalfundar við minst 3 vikurs og hægst 5 vikurs varningi. Ársaðalfundir skulu haldast áðrenn endan av mei mánaði.*

*Nevndin boðar til fundar við aðalfundarlýsing í einum ella fleiri av teimum størru føroysku dagbløðunum.*

*Aðalfundarlýsingin skal innihalda fundarskrá við tilskilan av fundarstaði og tíð. Verða uppskot at viðgera, ið til samtyktar krevja serligan meiriluta, skal hetta tilskilast í fundarboðunum.*

*Uppskot frá partaeigarunum skulu fyri at koma til viðgerðar á aðalfundi vera nevndini í hendi í seinasta lagi 6 vikur, áðrenn aðalfundurin verður hildin.*

*Eykaðalfundur verður hildin um avgerð er tikin um hetta av aðalfundinum, nevndini ella grannskoðara felagsins, ella um 5% av partapeninginum seta fram krav um hetta. Áheitan frá partaeigarum um eykaaðalfund skal sendast skrivliga til nevnd felagsins við fráboðan um, hvat evni skal viðgerast. Nevndin skal boða til eykaaðalfundar í seinasta lagi 14 dagar eftir, at krav er sett fram um hetta.*

*Frá tí at partabrøv felagsins eru skrásett á Oslo Børs, og so leingi sum partabrøvini framhaldnaði eru skrásett á Oslo Børs, skal innkallingin til aðalfund og sjálvur aðalfundurin, umframt at fylgja teimum krøvum sum framganga av hesum viðtøkum, eisini fylgja teimum krøvum, sum til eina og hvørja tíð verða sett av Oslo Børs."*

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum**

Partaeigarar, sum ynskja at luttaka á aðalfundinum, verða bidnir um at senda luttøkuskjalið, sum er at finna á heimasíðu felagsins www.bakkafrost.com, til P/F Bakkafrost, Bakkavegur 9, 625 Glyvrar, ella at senda luttøkuskjalið við telduposti til agm@bakkafrost.com, ella á telefax nr. +298 405009. Luttøkuskjalið kann eisini útvegast við at ringja til felagið, tlf. +298 405000.

Luttøkuskjalið má vera móttikið av P/F Bakkafrost í seinasta lagi fríggjadagin tann 26. apríl 2024, kl. 24.00.

Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum fer eisini fram umvegis heimasíðu felagsins www.bakkafrost.com ella á skrivstovu felagsins Bakkavegur 9, FO-625 Glyvrar, ella á tlf. nr. +298 405000 og/ella telefax nr. +298 405009. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum er hósdagin tann 25. apríl 2024, kl. 24.00.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna.

Á heimasíðu felagsins www.bakkafrost.com, umframt á skrivstovu felagsins Bakkavegur 9, FO-625 Glyvrar, kunnu tygum útvega tygum eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi. Atkvøðugreiðsla við fulltrú hevur sum fyritreyt, at fulltrúarhavarin fyrivísir fulltrú sína fyri fundarstjóranum. Fulltrú kann eisini gevast nevnd felagsins. Slíkar fulltrúir kunna sendast til nevndarformannin umvegis teldupost á teldupostbústaði agm@bakkafrost.com.

Tað er ikki møguligt at greiða elektroniska atkvøðu á sjálvum aðalfundinum.

Sambært viðtøkum felagsins hava partabrøv atkvøðurætt á aðalfundinum, sum eru skrásett í seinasta lagi 1 viku undan aðalfundinum. Samsvarandi hesum hava partabrøv, sum eru skrásett í seinasta lagi 23. apríl 2024, kl. 24.00, atkvøðurætt.

**Ársfrásøgn 2023 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum**

Ársfrásøgnin fyri 2023 við notum fyri P/F Bakkafrost og fyri Bakkafrost samtakið, sum eisini inniheldur frágreiðing frá nevnd og stjórn felagsins og grannskoðaraátekning fyri 2023 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum, verður almannakunngjørd á heimasíðu felagsins www.bakkafrost.com frá og við mikudag 27. mars 2024.

Krøv frá partaeigarum felagsins um at taka upp eitt ávíst evni til dagsskránna á aðalfundinum skuldu verið sett fram skrivliga fyri nevnd felagsins á bústaðnum Bakkavegur 9, FO-625 Glyvrar, Føroyar, ella á teldupostbústaðnum agm@bakkafrost.com í seinasta lagi týsdag tann 19. mars 2024, og freistin er tí farin. Móttekur felagið uppskot til evni til dagsskránna eftir 19. mars 2024, ger nevndin av, um kravið er sett fram í so góðari tíð, at evnið kann verða sett á dagsskránna.

**Partapeningur, atkvøðurættur og kontoførandi peningastovnur**

Partapeningur felagsins er DKK 59.227.607 býttur í 59.227.607 partabrøv við einum áljóðandi virði av DKK 1. Felagið eigur sjálvt 1.222 partabrøv. Hesi partabrøv hava ikki atkvøðurætt.

Í § 7 í viðtøkum felagsins er ásett, at partaeigararnir hava 1 atkvøðu fyri hvørjar DKK 1, teir eiga í partapeningi.

§ 8 í viðtøkum felagsins er soljóðandi:

*„Partaeigari hevur rætt til at luttaka á aðalfundi, um viðkomandi partaeigari í seinasta lagi 3 dagar áðrenn aðalfundin hevur givið felagnum fráboðan um, at hann ætlar at luttaka á aðalfundinum. Partaeigari hevur rætt at møta persónliga ella saman við einum ráðgeva. Partaeigarar felagsins hava eisini rætt til at møta við fulltrú, sum partaeigarans vegna kann greiða atkvøðu sambært skrivligu fulltrúini. Fulltrúin kann vera galdandi fyri eitt ávíst tíðarskeið, tó ikki longur enn eitt ár. Umboð fyri fjølmiðlarnar og umboð fyri Oslo Børs hava atgongd til aðalfundin."*

Í § 7, stk. 2 í viðtøkum felagsins er ásett, at:

*„Á aðalfundi hevur partaeigari atkvøðurætt við teimum partabrøvum, sum eru skrásett í seinasta lagi 1 viku undan ársaðalfundinum."*

Felagið hevur útnevnt Nordea Bank AB (publ), filial i Norge, Essendropsgate 7, PO box 1166 Sentrum, 0107 Oslo, Norway, 983258344 MVA til kontoførandi peningastovn, og kunnu parteigarar felagsins venda sær til henda peningastovn fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

Glyvrar, tann 27. mars 2024

**P/F Bakkafrost**

**Fyri nevndina**

Rúni M. Hansen, nevndarformaður

## Fylgiskjal 1 – Nevndarlimir í uppskoti

**RÚNI M. HANSEN**
Føddur í 1967. Føroyingur. Kom í nevndina í í Bakkafrost í 2009 og hevur verið formaður síðan tá. Formaður í nevndini hjá vinnufelagnum Tjaldur og í Mintra, ið er børsskrásett á Oslo Euronext Growth..Limur í Global Compact´s Platform for Sustainable Ocean Business hjá ST.

Rúni M. Hansen hevur drúgvar altjóða royndir bæði innan orkuvinnuna og sjógæti. Hann arbeiddi nógv ár hjá altjóða orkurisanum Equinor, var partur av leiðsluni, og hevði millum annað sæti í London, Keypmannahavn, Oslo og í Føroyum hesi árini. Hann hevur eisini royndir innan skipaferðsluvinnuna.
*Útbúgving:*
MSc. í búskaparfrøði og virkisleiðslu, Copenhagen Business School. Postgraduate, Lancaster University.

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Átti 10.761 partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður mettur at vera óheftur.

**TEITUR SAMUELSEN**
Føddur í 1972. Føroyingur. Kom í nevndina í Bakkafrost í 2016. Stjóri í P/F Eystur- og Sandoyartunlar og P/F Suðuroyartunnilin.

Teitur Samuelsen hevur drúgvar royndir frá grannskoðan og fígging. Hann hevur arbeitt hjá KPMG og Dong E/P í Danmark og hevur verið fíggjarstjóri í Atlantic Petroleum (2005–2009) og á Bakkafrost (2009-2014). Teitur Samuelsen er í løtuni limur í nevndini í Betri Trygging, nevndarformaður í Bústaðir og limur í grannskoðaraeftirlitinum.

*Útbúgving:*
MSc. í búskaparfrøði & grannskoðan, Copenhagen Business School

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost::*
Átti 100 partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður mettur at vera óheftur

**ANNIKA FREDERIKSBERG**
Fødd í 1971. Føroyingur. Kom í nevndina í Bakkafrost í 2008. Søluleiðari á Bakkafrost.

Annika Frederiksberg hevur drúgvar royndir frá laksavinnuni og sølu. Hon hevur verið partur av fyrisitingini og søluliðinum hjá Bakkafrost í meira enn 25 ár.

*Útbúgving:*
Prógv frá Føroya Handilsskúla.

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Átti beinleiðis og óbeinleiðis 16.781 partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður ikki mett at vera óheft.

**ØYSTEIN SANDVIK**
Føddur í 1948. Norskur ríkisborgari. Kom í nevndina í Bakkafrost í 2013.

Øystein Sandvik hevur drúgvar royndir frá fíggjarvinnuni og sjógæti. Hann hevur havt fleiri størv í Nordea Bank Norge innan aling og fiskivinnu. Øystein Sandvik er í løtuni nevndarlimur í Coldwater Prawns of Norway AS.

*Útbúgving:*
Búskaparfrøðingur innan banka.

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Átti eingi partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður mettur at vera óheftur.

**EINAR WATHNE**
Føddur í 1961. Norskur ríkisborgari. Kom í nevndina í Bakkafrost í 2019.

Einar Wathne hevur drúgvar royndir frá sjógætisvinnuni og hevur verið stjóri í Cargill og EWOS.

*Útbúgving:*
Master í Animal Nutrition, NMBU.
Ph.D. í Aquaculture, NMBU.
MBA, Handelshøyskolen BI.

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Átti eingi partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður mettur at vera óheftur

**GUÐRIÐ HØJGAARD**
Fødd í 1972. Føroyingur. Kom í nevndina í Bakkafrost í 2022. Stjóri í Visit Faroe Islands og fyrrverandi marknaðarstjóri í Visit Stockholm.

Guðrið Højgaard hevur drúgvar royndir innan altjóða marknaðarføring og marking. Hon hevur arbeitt í ferðavinnuni í Svøríki, Danmark og Føroyum. Hon hevur eisini drúgar royndir við nevndararbeiði og er í løtuni nevndarlimur í P/F Postverk Føroya og Framtak.

*Útbúgving:*
MSc. í Business Administration & International Marketing, Copenhagen Business School og Stockholm University.

*Nevndarfundir í 2023:*
Var við á øllum 11 nevndarfundunum í 2023.

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Átti eingi partabrøv við ársenda 2023.

*Óheftni:*
Verður mett at vera óheft.

**ALF-HELGE AARSKOG**
Føddur í 1967. Norskur ríkisborgari.

Alf-Helge Aarskog hevur drúgvar royndir frá sjógætisvinnuni og hevur verið stjóri í Lerøy Seafood Group og Marine Harvest/Mowi.

*Útbúgving:*
Master í Aquaculture, NMBU.
Útbúgvin í leiðslu frá Harvard Business School

*Tal av partabrøvum í Bakkafrost:*
Eigur 300 partabrøv.

*Óheftni:*
Verður mettur at vera óheftur